# Havnin á veðurlagsráðstevnu

Borgarstjórin í Havn, Heðin Mortensen, er við á altjóða veðurlagsráðstevnuni COP15 í Bella-sentrinum, og eisini á eini serligari veðurlagsráðstevnu fyri borgarstjórar úr øllum heiminum, "Climate Summit for Mayors", sum Ritt Bjerregaard, yvirborgarstjóri er vertur fyri, í ráðhúsinum í Keypmannahavn.

Endamálið við hesi serligu veðurlagsráðstevnu fyri borgarstjórar er at senda ríkisleiðarunum ein greiðan boðskap frá býum kring allan heimin, har meiri enn 50 prosent av øllum heimsins fólki býr, til ríkisleiðararnar og onnur, um at býirnir gera nakað við veðurlagsspurningar og krevja at ríkisleiðarar eisini gera nakað.

Nógv virksemi verður á borgastjóraráðstevnuni, sum byrjar í morgunin við vitjan á skúlum og barnaansingarstovnum, sum hava gjørt nakað serligt fyri at byggja og virka á ein umhvørvisvinarligan hátt. Heðin Mortensen er á hesi vitjan saman við kommunustjóranum, Ingibjørg Berg, og tekniska stjóranum, Jákup Egholm Hansen.

Seinnapartin skal borgarstjórin í Havn saman við øllum hinum borgarstjórunum og samráðingarleiðarum fyri altjóða samráðingarnevndirnar til eina móttøku á Amalienborg, har Fríðrikur krúnprinsur er vertur. Og dagurin endar við eini móttøku til heiðurs fyri yvirborgarstjóran í Keypmannahavn, Ritt Bjerregaard, sum The United States Conference of Mayors er vertur fyri.

## Sjálv setanin

Í morgin verður sjálv setanin av veðurlagsráðstevnuni fyri borgarstjórar í ráðhúsinum í Keypmannahavn, og er tað fyrrverandi amerikanski forsetin, Bill Clinton, ið setur ráðstevnuna. Síðani hava borgarstjórar í fleiri stórum býum framløgur, teirra millum Michael R. Bloomberg, borgarstjóri í New York, og Boris Johnson, borgarstjóri í London, um arbeiðið í ymsu býunum fyri at minka um útlatið av vakstrarhúsgassi.

Hetta gongur m.a. fyri seg í eini stórari framsýningarhøll, ið er bygd upp mitt á Ráðhúsplássinum, har framsýningar eru um framtíðarinnar býir. Eisini verða rundborðssamrøður um, hvat býir kunnu og vilja gera á umhvørvisøkinum.

Seint týsdagin er Heðin Mortensen saman við hinum borgarstjórarunum við í sjálvari setanini av politiska partinum av altjóða COP15-veðurlagsráðstevnuni í Bella-sentrinum.

## Almenn niðurteljing

Mikudagurin byrjar við framløgum og panelfundum um m.a. almenn/privat partaløg, og eru nakrir av høvuðsrøðarunum Arnold Schwarzenegger, guvernørur í Kalifornia, Angel Gurria, aðalskrivari í OECD, Robert B. Zoellick, forseti í Heimbankanum, og Richard Branson, stovnari og nevndarformaður í multinationala felagnum Virgin Group, sum eitt nú eigur lágprísflogfeløg, og tónleikaframleiðslufeløg, sum hava framleitt tónleik fyri Culture Club, Sex Pistols og Rolling Stones.

Seinnapartin mikudagin er Heðin Mortensen við til fyrilestrar á universitetinum í Keypmannhavn, har greitt verður frá klimagransking, áðrenn borgarstjórarnir aftur fara út á altjóða ráðstevnuna í Bella-sentrinum, har teir fara at handa ríksleiðarunum eina yvirskrift við úrslitunum frá veðurlagsráðstevnuni fyri borgarstjórar.


*Umboðini hjá Tórshavnar kommunu á veðurlagsráðstevnum í Keypmannahavn hesa vikuna. Frá vinstru Ingibjørg Berg, kommunustjóri, Heðin Mortensen, borgarstjóri, og Jákup Egholm Hansen, tekniskur stjóri*

Veðurlagsráðstevnan fyri borgarstjórar endar við, at Connie Hedegaard, nýtilnevndur ES-ráðharri, saman við øðrum heldur fyrilestur í ráðhúsinum, áðrenn eina almenna niðurteljing, tá alt ljós verður sløkt og ymsir boðskapir verða vístir á stóra globussinum á Ráðhúsplássinum. Hetta tiltak verður sent øllum stjórnarleiðarum og annars kring allan heimin.

## "Grønt" røktarheim

Hósdagin er borgarstjórin aftur á skrivstovu síni í Havn, har býráðsfundur verður hóskvøldið. Eitt av málunum á skránni fyri býráðsfundin er góðkenning av byggiskrá fyri nýggja røktarheimið Yviri við Strond, har ætlanin er at kannað møguleikarnar fyri upphiting við jarðhita, umframt onnur orkusparandi tiltøk í samband við byggingina.


STARVSLÝSING

## Formaður til vegadeildina á Landsverki

Landsverk søkir eftir formanni til at fyriskipa og samskipa dagliga arbeiðið í Sandoynni.

**Arbeiðsuppgávur**
Í samstarvi við økisformannin í miðøkinum fært tú dagligu leiðsluna av arbeiðinum í Sandoynni, har í alt tveir menn umframt formaðurin starvast.

Arbeiðsuppgávurnar fevna í høvuðsheitum um alt vanligt hald av landsvegunum, vetrarhald, størri ábøtur og trygdartiltøk. Aðrar uppgávur kunnu eisini vera, eitt nú arbeiði í grótbrotinum í Krókafossi.

Arbeiðsøkið verður í Sandoynni, men roknast má eisini við uppgávum aðrastaðni í landinum.

**Førleikakrøv**
Tað er ein treyt, at tú hevur stóra koyrikortið og ert førur fyri at koyra vanligar entreprenørmaskinur, eitt nú gravimaskinur og lessimaskinur.

Tað er eisini ein treyt, at tú ert førur fyri at seta teg inn í og at arbeiða við nýggjari tøkni. Tú skalt hava miðalgóðan telduførleika og grundleggjandi kunnleika um tekstviðgerð og rokniark.

Tú ert ein góður leiðari og dugir væl at leiða og samskipa dagliga arbeiðið.

Harafturat vænta vit, at tú dugir væl at samskifta, bæði munnliga og skrivliga. Tú dugir eisini væl at samstarva og ert arbeiðssamur, dugnaligur og væl skipaður. Tú arbeiðir sjálvstøðugt, ert fyrikomandi og ein arbeiðsglaður viðleikari, ið gevur eitt jaligt íkast til arbeiðsplássið.

Tann, ið verður settur í starvið, skal vera sinnaður at luttaka í førleikamenning, herundir formansútbúgving í leiðslu, ið Landsverk skipar fyri komandi ár.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við avritum av prógvum, CV og øðrum viðkomandi skjølum verður at senda til lv@lv.fo ella til:

Landsverk,
Postsmoga 78,
FO-110 Tórshavn,

og skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 17. desember 2009 kl. 08.00. Merk umsóknina „Formaður til Sandoynna." Vinarliga viðmerk eisini í umsóknini, hvar tú hevur sæð starvslýsingina.

Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Finnleif Durhuus, rakstrarleiðara, á tel. 540 800 ella á finnleif@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Innlendismálaráðnum og hevur um hendi vega- og havnamyndugleikauppgávur og byggiharrauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og flogvøllir, herundir tyrlupallar.*


